## Kjarnorkuverk í Arktis

Russar arbeiða við ætlanum um at byggja fleiri smá kjarnorkuverk, sum kunnu flytast úr einum stað í annað, og sambært bretska blaðnum The Guardian ætla russar serliga at brúka hesi verkini í tí arktiska økinum. Har skulu verkini lata streym í sambandi við olju- og gassleiting, og sambært blaðnum ætlar almenna olju- og gassfelagið Gazprom eisini at brúka smá kjarnorkuverk til sítt virksemi í Barentshavinum. Eftir upplýsingunum, sum bretska blaðið hevur fingið, kunnu tey smáu kjarnorkuverkini útvega 70 megawatt av streymi hvørt. Hvørt verk skal hava tveir reaktorar, og verkini skulu sjálvi goyma burturkastið.



## Nýggj stjórn næsta vikuskiftið

Samráðingarnar um at skipa nýggja stjórn í Íslandi halda fram. Í gjár hildu leiðslurnar í Samfylkingini og teimum vinstragrønu ein tveir tímar langan fund, har umboðini umrøddu tað, sum ymsir arbeiðsbólkar hava lagt fram. Morgunblaðið skrivar, at teir báðir flokkarnir miða eftir at skipa stjórn næsta vikuskiftið, men tað er ikki greitt enn, at flokkarnir fara at út um tingmanningarnar at leita eftir fakfólki til ráðharrastørv. Ein av verandi ráðharrum, vinnumálaráðharrin Gylfi Magnússon, sigur við Mortunblaðið, at hann hevur ikki fingið at vita, um hann verður verandi í stjórnini ella ikki.

# Hjálparararbeiði - betri enn at ferðast



*Ása og Katrin á Neystabø við Anders Reimer Larsen frá Mellemfolkeligt Samvirke millum sín. Á stuðulstiltakinum í Norðurlandahúsinum fara tey at greiða frá um tað at fara upp í hjálpararbeiði. Pengarnir fara til at byggja nýggjan skúla í Gana, har tær hava gjørt hjálpararbeiði*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Katrin og Ása á Neystabø fingu teirra lívsins uppliving í Gana, har tær gjørdu hjálpararbeiði. Tað er betri enn at ferðast, eru tær samdar um. Hóskvøldið verður stóra stuðulstiltakið, har tær fara at kunna um tað at gera hjálpararbeiði**

HJÁLPARARBEIÐI
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Hvat gert tú, um tú ætlar tær út at gera hjálpararbeiði? Hvar vendir ein sær fyri at fáa vegleiðing? Hvørjir møguleikar eru? Hesir og nógvir aðrir spurningar mólu í høvdinum á Katrin á Neystabø, tá hon fyri knøppum ári síðan var liðug við sína útbúgving.

- Eg havi altíð ætlað mær at sloppið út í verðina, og tá eg var liðug við skúlan, var tíðin líka sum uppløgd. So eg fór á fund hjá Mellemfolkeligt Samvirke í Århus, sum regluliga skipar fyri tílíkum fundum, og endin var at eg fór til Gana at gera hjálpararbeiði, greiðir hon frá.

Tá hon fór at pakka sínar taskur, avgjørdi sambúgvin og vinkonan, Birita Wardum at koma við henni, og tá avtornaði vildi lítlasystirin, Ása á Neystabø, eisini koma við. Hon hevði júst gjørt seg liðna við sína miðnámsútbúgving. Tríggjar hvítar genturur við ljósum hári løgdu leiðina til Gana at undirvísa afrikonskum børnum, í einum fremmandum landi, har tær ikki ánaðu hvat bíðaði teimum har.

### Hvat skal mann vænta?

- Áðrenn eg fór avstað, hugsaði eg nógv um hvussu tað mundi síggja út í Gana, og hvat eg kundi vænta. Men eg fekk onga veruliga mynd fram av hesum landinum. Eg hugsaði at tað var myrkt, fátæksligt og at tey kanska høvdu mold á gólvinum. Ella mundu tey yvirhøvur hava mold? Tá eg so kom har, fann eg út av at tey høvdu ikki rennandi vatn, sum eg heldur ikki hevði roknað við, har var ófatiliga heitt, larmandi og so framvegis. Men kortini var tað slettis ikki so galið. Til dømis fingu vit sengur at sova á, sigur hon.

Gana telist millum tey afrikonsku londini, sum eru rættiliga væl fyri. Landið liggur í Vesturafrika, og er gomul ensk koloni. Tað var torført at síggja mun á hvør hevði tað gott og hvør hevði tað minni gott, tí í skúlanum skuldu øll vera í skúlabúnum. Tað var ikki fyrr enn tær fóru heim at vitja børnini, at tær sóu hvussu misjavni standurin var millum børnini.

Tríggir mánaðir fóru framvið við tí rúkandi ferð, og síðan hendan túrin hava genturnar verið og vitjað Gana eina ferð. Og stendur tað til teirra, fara tær aftur til Gana í minsta lagi eina ferð afturat.

Tað er kortini ikki ókeypis at fara avstað sum sjálvboðin. Okkara gentur rindaðu 30.000 krónur til Mellemfolkeligt Samvirke áðrenn tær fóru úr Danmark, og hesir pengar tryggjaðu teimum tak yvir høvdið og mat hvønn dag. Haraftureímóti nýtist ongum at brúka nógvan pening í Gana.

### Føroyingar vilja stuðla

Hóskvøldið verður stóra stuðulstiltakið í Norðurlandahúsinum, har genturnar hava savnað nakrar av best umtóktu tónleikarum í Føroyum, umframt at tær hava skipað fyri eini uppboðssølu av listaverkum, sum byrjaði í morgun. Tá genturnar vóru í Miðlahúsinum í morgun, vóru fleiri boð komin inn, hóast uppboðssølan júst var upplatin. Endamálið er at savnað inn penging til at byggja skúla í Gana. Konsertin varð útseld alt fyri eitt, og fer peningurin óskerdur til skúlabygningina. Áhugin millum føroyingar fyri at stuðla tiltakinum vísir seg at vera ovurhondsstórur.

- Nøkur hava sagt nei, tí tað tað er ímóti teirra prinsippum, og tí hava vit sjálvsagt virðing fyri. Men tey flestu hava víst ein sera stóran áhuga fyri tiltakinum, og hava sett seg í samband við okkum fyri at vita um tey kunnu hjálpa á onkran hátt.

Men stuðulstiltakið er ikki bara ein pengainnsavning.

- Vit fara at hava eitt upplýsandi tiltak, har Ása fer at greiða frá okkara upplivingum, og Anders Reimer Larsen frá Mellemfolkeligt Samvirke fer at greiða nærri frá Global Contact og teirra samstarvi við hjálparfelagsskapir í menningarheiminum.

Hetta gera tær, tí tær hava merkt eitt forvitni frá ungum, ið kundu hugsað sær at farið út í verðina at gjørt hjálpararbeiði.

- Fleiri ung droyma um at at sleppa at út at síggja verðina, tá tey til dømis eru liðug við sína miðnámsútbúgving. Tá velja nógv at fara at fjakka, men vit vilja við hesum tiltakinum fegin vísa á møguleikan at fara út í verðina at gera hjálpararbeiði í staðin. Fyri okkum var tað betri enn at ferðast, sigur Ása á Neystabø.

**Tónleikur á Stuðulstiltakinum:**
ORKA v/Eivør
Frændur
Boys in a Band
Høgni Lisberg
Dánjal
Bet Your Are William
Martin Joensen
Hallur Joensen
Lady Fire
Petur Pólson

**Listafólk á Stuðulstiltakinum:**
Høgni Thomsen
Vera Larsen
Maibritt Frederiksberg
Maria Mørkøre
Frits Johannesen
Øssur Mohr
Sirikit Jacobsen
Jón K. Poulsen
Bárður Dal Christiansen
Jóannes Lamhauge
Edith Mørkøre
Eli Smith
Harry Knusdsen
Ásla Rannvá Svendson
Nikolina Højgaard
Guðrún & Guðrun - Troyggja
Bergun Kass
Katrin Svabo Bech
Zacharias Heinesen
Beinta Vilhelmsen – Kjóli
Kristina Joensen
Eivør Pálsdóttir
Ann-Mari Mouritsen
Sámal Toftenes
Ása Thomsen
Hedvig Johansdóttir
Gunnar Streymoy
Sigrun Gunnarsdóttir

**Yrkjarar, ið koma at lesa upp yrkingar:**
Hanus Kamban og
Marjun Syderbø Kjelnæs

**Onnur spennandi innsløg:**
Jóna Thomsen kemur at dansa
Uppboðssøla av 8 listaverkum - 6 málningar og 2 pløgg í konsertsalinum
23 listaverk eru á uppboðssølu frá 4. til 7. mai (framsýning í SMS og í Klingruni í NLH)